# ítróttur

Nr. 96 • mikudagur • 25. mai 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Havnar Timburhandil vil byggja fótbóltshøll

**Tríggjar verkætlanir um nýggja fótbóltshøll vórðu mánadagi handaðar FSF. Svangaskarð, eitt samtak við Skálafjørðin og Havnar Timburhandil standa handan verkætlanirnar**

FÓTBÓLTSHØLL
*Jákup Mørk*




*Havnar Timburhandil legði seg mánadagin út í kappingina um ger av eini fótbóltshøll í Føroyum*

Kl. 15.30 í gjár var freistin um at leggja fram verkætlanir um eina fótbóltshøll í Føroyum farin. Hetta er ein verkætlan, sum FSF hevur sett í kortið, eftir at tað stóð greitt, at sonevndi Hat-trick grunnurin hjá FIFA fór at lata á leið 12 mió kr. Í stuðuli til menning av fótbólti í Føroyum.

Nøkur projekt um eina slíka høll hava longu verið frammi, men tað eru tó ikki øll av hesum, sum framvegis eru við í kappingini. Hóast tey í FSF ikki vilja siga tað stóru um, hvørjar ætlanir eru innkomnar, so váttar Ísak Mikladal, aðalskrivari, at talan er um tríggjar verkætlanir, sum eru lætnar Fótbóltssambandinum.

Eitt hitt fyrsta projektið, sum varð kunnugt fyri almenninginum, var ein verkætlan hjá kommunum kring Sundalagið. Hesar eru nú at kalla allar savnaðar í eini kommunu, men ein nýggj fótbóltshøll er so ikki millum tað, sum hesi í løtuni arbeiða við.

Heldur ikki hevur nakað veri ðat hoyrt til ætlanina hjá Vágoynni um at gera eina fótbóltshøll har, eins og tosið um eina høll í høvuðsstaðnum tykist vera tagnað, hóast tey bæði stóru havnarfeløgini komu við felags áheitan til býráðið um at fara undir slíka verkætlan.

### Svangaskarð og Skálabotnur

Av teimum ætlanum, sum áður hava verið frammi, eru tað soleiðis tær báðar ætlanirnar á Svangaskarði og í Skálabotni, sum enn eru við í kappingini.

Á Svangaskarði hava tey í eina tíð arbeitt við eini ætlan, sum í høvuðsheitum gongur út uppá at leggja tak á Svangaskarð og annars skifta grasið út við graslíki. Fyrimunirnir her eru sjálvandi fyrst og fremst, at sjálv høllin og fótbóltsteppið eru einastu lutir, sum skulu gerast. Planeringsarbeiðið og ytru karmarnir sum so eru jú longu á staðnum, og tí vil ein slík verkætlan alt annað líka vera væl bíligari, enn um alt arbeiðið skal gerast av nýggjum. Hinvegin er kravfestingin til eina komandi fótbóltshøll enn ikki heilt greið, og tí kann hugsast, at partar av fasilitetunum, sum eru við Svangaskarð, eru partvíst yvirdimensioneraðir, og at aðrar verkætlanir tí kunnu hava eina lægri kravfesting.

Í grannabygdini, Runavík, ganga eisini menn við ætlanum um eina fótbóltshøll. Tað er umleið hálvt annað ár síðani, at vit her í blaðnum skrivaðu um ætlanirnar at byggja eina høll á Lambareiði, og tó at ætlanin síðani er flutt til Skálabotn, so er talan stórt sæð um somu verkætlan. Í hesi hevur stórur dentur verið lagdur á sentralu plaseringina, sum høllin fær við hesum. Verður hugt at spjaðingini í føroyskum fótbólti, so er lítið at ivast í, at Eysturoyggin er eitt slag av snúningspunkti í hesum, og við eini koyrifjarstøðu upp á í mesta lagi trý korter hjá flestu feløgunum í landinum - Sandoy og Suðuroy undantikin - meta stigtakararnir til hesa verkætlanina seg hava gott grundarlag fyri rakstur av høllini.

### Timburhandilin vil við

Seinasta verkætlanin, sum er við í kappingini, er ein ætlan hjá Havnar Timburhandli.

Heini Fossá, stjóri í Timburhandilin, sigur, at orsøkirnar til boðið frá teimum eru fleiri. Her og nú vil hann ikki fara í smálutir við hesum, men hann vísir á, at talan er um eina stóra verkætlan.

- Tað vóru sum so ikki vit, sum byrjaðu hetta projektið, men heldur at kalla arvaðu tað. Vit hildu tó, at hetta var vert at arbeiða víðari við, og nú halda vit eisini, at vit eru komnir til eitt úrslit, sum er vert at vísa fram, sigur hann.

Enn er eingin freist sett fyri viðgerðini av umsóknunum, men sambært aðalskrivaranum í FSF, so byrjar hendan helst hampuliga skjótt.

- Nú er sjálvandi so stutt liðið, síðani umsóknirnar komu inn. Vit fara so í dag (týsdagin, blðm.) at hyggja tilfarið ígjøgnum, og síðani verður hetta sent limunum í hallarbólkinum. Nær sjálv viðgerðin av hesum so verður, fái eg ikki svarað fyri, men væntandi kann hon byrja longu í komandi viku, er einasta viðmerkingin, sum aðalskrivarin hevur um málið.



*Lítið er at ivast í, at John Petersen kann gerast ein framúr fongur hjá toftamonnum til týdningarmiklu dystirnar í juli mánaði*

# John skal spæla við B68

**Toftamenn hava gjørt avtalu við John Petersen um at spæla við teimum, meðan hann er í Føroyum í summarfrí**

B68
*Jóannes Hansen*

Nei. Tað er einki í søguni, sum í vikuskiftinum fekk bein at ganga á, og sum gekk út uppá, at Todi Jónsson skuldi spæla við B68.

Men tað er púra vist, at John Petersen í summar fer at hjálpa toftamonnum. Tað váttar B68 formaðurin, Niclas Davidsen:

- Vit hava gjørt avtalu við John Petersen um, at hann skal venja og spæla við okkum, meðan hann verður í Føroyum í summarfrí. Vit rokna við, at hann kemur heim síðst í juni. Enn er ikki greitt, hvussu leingi hann fer at vera heima, men ætlanin er, at hann skal spæla við okkum, inntil hann fer niður aftur.

Í landskappingini gongur strúkandi hjá B68, sum hevur fult stigatal og einki mál hevur fingið ímóti sær í 2. deild. Í juli mánað verður einki umfar í landskappingini í næstbestu deildini, men aðrar stórar avbjóðingar standa fyri framman:

- Higartil hava okkara menn víst, at teir eru førir fyri at standa seg í kappingini í 2. deild. Í juli skulu vit spæla finalu í kappingini um FSF steypið ímóti B71, og so skulu vit á heimavølli og á útivølli stríðast við fuglfirðingar um pláss í finaluni um Løgmanssteypið. Ætlanin er, John Petersen skal vera við okkum í hesum trimum dystunum. So fáa vit at síggja, hvussu tað fer at roynast. Megna vit at spæla okkum í steypafinaluna, so er ætlanin, at John eisini skal hjálpa okkum í tí førinum, sigur Niclas Davidsen.

John Petersen hevur síðani hann í heyst flutti til Danmarkar, spælt við Holsterbro, sum er í sonnum ódnarveðri fyri at varðveita plássið í triði bestu deildini.